**Sjálvstýrisflokkurin**

Landsstýrismálanevndin
Tinghúsvegur
100 Tórshavn

27. mars 2008

**Evni: Viðgerð landsstýrismansins í almannamálum av málinum um gjald yvirlækna fyri høli og annað í samband við privata viðtalu hjá yvirlæknum**

Góðu tit,

Vísandi til § 38 í stýrisskipanarlógini og § 2 í starvsskipan nevndarinnar heiti eg við hesum á landsstýrismálanevndina um at taka nevnda mál til viðgerðar.

Kunnleiki mín til málið er fyrst og fremst grundaður álit, ið løgtingsgrannskoðararnir hava gjørt fyri fíggjarárið 2006 í samandrátti av frágreiðingum frá privatum grannskoðarum.

Sum skilst er ábreiðsla farin fram í sera drúgva tíð í hesum ofta reista spurningi.

Løgtingssgrannskoðararnir skriva soleiðis: "Spurningurin um at gjalda fyri at nýta høli, starvsfólk, kanningarstovnar o.a., í sambandi við privata viðtalu hjá yvirlæknum á sjúkrahúsunum, var ikki greiddur. Grannskoðarin hevði enn eina ferð heitt á leiðslurnar á sjúkrahúsunum um at fáa viðurskiftini í rættlag" (Mín undirstriking).

Víðari verður sagt: "Einki er hent í málinum. Spurdur, svaraði landsstýrismaðurin í desember 2006, at hann veit ikki at siga, nær málið verður loyst."

Og seinni: "Í august 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at [hann] veit ikki at siga, nær málið verður loyst."

Hetta er samstundis sum kr. 1.300.000 verða goldnar út eyka í yvirtíð til yvirlækna, og samstundis sum játtanin fyri sjúkrahúsøkið ikki verður hildin.

Greitt tykist vera, at landsstýrismaðurin hevur misrøkt málið og ikki gevur løgtingsgrannskoðarunum gætur. Tí verður nevndin biðin um at taka málið upp.

Vinarliga

Kári á Rógvi,
løgtingsmaður

1. APR. 2008

Løgtingið j. nr. 7/3.2008.0006 - 1